*Framhald av síðu 23*

tjóða fyritøku? Ein heimur, har forbrúkarin hevur eitt sindur av valdi, meðan tey, sum ikki hava ráð til forbrúk, einki vald hava?

Teir stóru flokkarnir hava tey seinastu árini talað um at fáa kapitalismu og alsk til menniskja at sættast. Tony Blair hevur tosað um *"tann triðja vegin"*, og Bush tosar um "samvitskufulla konservatismu".

Í Amerika ljóðar hetta meir og meir innantómt. USA er á botni, tá mált verður, hvussu stóran part av bruttotjóðarfram-leiðsluni ídnaðarlondini brúka til sosial tiltøk og at basa misjavna.

Í Bretlandi hevur Labour verið ført fyri at minka ójavnan, hóast stjórnin virkar inna fyri avmarkingarnar hjá globalu, kapitalistisku skipanini. Hóast alt hava tær seinastu fíggjarlógirnar gagnað teimum fátæku. Tey niðastu 10% hava vunnið 9%, meðan tey ovastu 10% einki hava vunnið. Meira enn 2,5 miljardir pund eru fluttar úr ovaru í niðaru helvt av inntøkustiganum. Í 2000 boðaði fíggjarmálaráðharrin Gordon Brown frá, at hann ætlaði sær at bróta forboðið móti øktum útreiðslum og hækka almennu útreiðslurnar við 43 miljardum pundum. Peningurin skuldi brúkast til útbúgving og nýggj arbeiðspláss, barnavernd, flutning, fátækar landspartar og miðbýarprosjekt. Orsøkin til, at hetta bar til, var tann sterka búskaparstøðan. Útgjaldið til arbeiðsleys minkaði, meðan skattainntøkurnar vuksu nógv. Eisini vann ríkiskassin pening við at selja fartelefonnetið.

Vit sleppa ikki av við ráðaloysið í kapitalistisku øldini við at láta sum einki. Altjóða kreftir máa undan evnunum hjá myndugleikunum at varðveita vælferðarsamfelagið og at temja búskaparvaldið soleiðis, at samfelagið gerst meira humant og rættvíst. Samvitskan loyvir okkum ikki at lata vera við at umrøða møguleikan at avmarka anglo-amerikansku kapitalismuna, eina skipan sum so skammleys lívgar tey ríku og setir profittmotivið fram um alt annað. Tað er villleiðandi at siga, at vit sleppa undan í framtíðini at sóna málini um sosialt rættvísi og búskaparvøkstur uttan at spyrja: Vøkstur fyri hvønn?

## Ídnaðarnjósning

Stjórnirnar muga fara í holt við teir grundleggjandi spurningarnar og ikki snikja seg uttanum, skrivar Noreena Hertz. Hon skrivar eisini nógv um ídnaðarnjósning, sum serliga Bretland og USA hava staðið fyri, eftir at kommunisman fall. Tær radarskipanir, sum vóru gjørdar á syðru hálvu, at verja seg móti kommunismuni, vórðu eftir 1991 brúktar til at hava eftirlit við virkseminum hjá fyritøkum í londum, sum vóru sameind við Bretland og USA. Hetta kom fram í árinum 2000, tá amerikanska verjumálaráðið legði skjøl, sum høvdu verið loynilig, út á Internetið. Frammanundan visti almenningurin ikki av hesum. Tøknifrøðin var nú so væl útbygd, at skipanirnar kundu fáa fatur á hvørjum einasta orði, sum varð sagt, hvørjum faksi og telduposti, sum fór gjøgnum fylgisvein um allan heim. Tað rakti okkum øll.

Fáar dagar eftir, at hetta kom fram, kunngjørdi Evropatingið eina frágreiðing, har amerikanskar fyritøkur vórðu skuldsettar fyri at hava stolið sáttmálar, sum evropeiskar og asiatiskar fyritøkur skuldu havt. Frakland legði sak móti Bretlandi og USA, í Italia og Danmark vórðu løgfrøðiligar og parlamentariskar kanningar settar í verk, og ein belgiskur limur í Evropatinginum segði framferðina vera brot á mannarættindini.

*"Evropearar vóru skakaðir, tá teir vórðu varugir við, at Big Brother var ikki longur tað kommunistiska Russland ella Reyða Kina, men at tað var USA, ið skuldi eitast at vera sameint hjá Evropa, sum njósnaðist hjá evropeiskum forbrúkarum og fyritøkum fyri at vinna sær sjálvum handilsligan fyrimun"*, skrivar høvundurin.

Eitt dømi um ídnaðarnjósning er Enercon, ein týskur framleiðari av vindgeneratorum. Í 1999 uppfann fyritøkan ein máta at generera el frá vindmyllum nógv bíligari, enn gjørligt var frammanundan. Tá fyritøkan royndi at marknaðarføra uppfinnilsið í USA, fekk hon at vita frá amerikanska kappingarneytanum Kenetech, at hon hevði longu tikið patent uppá eina tøknifrøði, ið var meinlík teirri týsku. Ein dulnevndur amerikanskur ídnaðarnjósnari greiddi síðani frá, at hann hevði gjøgnum fylgisvein avlurtað telefonog datulinjurnar millum rannsóknarstovuna og framleiðsludeildina hjá Enercon. Upplýsingarnar vórðu so latnar Kenetech.

Ein franskur løgfrøðingur segði í 2000, at *"tú kanst vera vísur í, at hvørja ferð ein franskur ráðharri tosar í fartelefon, verður hann avlurtaður."*

Tíðliga í sínum fyrra valskeiði vardi Bill Clinton rættin hjá amerikanska vinnulívinum at fremja ídnaðarnjósning. Hann er endurgivin fyri at siga: *"Tað, sum er gott fyri Boeing, er gott fyri Amerika."*

Og Noreena Hertz spyr: *"Var hetta tann nýggja heimsskipanin, vit vónaðu at fáa í kalda krígnum?"*

Men rætt skal vera rætt. Tað vóru ikki bara bretar og amerikanarar, sum njósnaðust. Tað gjørdu hini ídnaðarlondini eisini. Í ES-frágreiðingini varð sagt, at Frakland og Týskland samstarvaðu um at avlurta bæði Norður- og Suðuramerika. Kina eggjar kinesiskum studentum uttanlands til at senda ídnaðarloynidómar heim, og japanarar eru kendir sum rættiligir meistarar í ídnaðarnjósning.

Eftir kalda kríggið, í øldini hjá altjóða lat-standa-tilkapitalismuni, tykist tað, sum at handilslig og búskaparlig áhugamál hava størri týdning enn øll tjóðskaparlig áhugamál. Myndugleikarnir eru ikki longur náttarvørðar, sum Adam Smith helt, teir áttu at vera fyri at tryggja vinnuni góð úrslit, men heldur duravørðar alt samdøgrið fyri høvuðsskrivstovuna hjá børsnoteraða privata partafelagnum.

## Handilsmál fram um alt

Búskapur er tann nýggi politikkurin, og tað er vinnulívið, sum heldur róðrinum. Fyrrverandi amerikanski uttanríkisráðharrin Madeleine Albright segði, at eitt høvuðsstarv hjá uttanríkisráðnum var at ansa eftir, at áhugamálini hjá amerikanskum fyritøkum og arbeiðstakarum vórðu rættvíst viðgjørd. Tað er eisini eyðsýnt, at USA vildi hava herfong í Irak, tí einans amerikanskar fyritøkur sluppu við á listan av úrvaldum fyritøkum, sum skuldu byggja Irak uppaftur.

Handilslig áhugamál gjørdust eisini skjótt mest týðandi mátturin í Russlandi, eftir at Sovjetsamveldið hoknaði saman. 20. september 1994 skrivaði almenna oljufelagið Lukoil undir sáttmála um at leita eftir olju í Aserbadjan saman við vesturlendskum oljufeløgum sum BP, Agip og Statoil. Sáttmálin varð kallaður *"aldarinnar kvetti"*, tí roknað varð við, at oljuframleiðslan í Aserbadjan fór at geva 100 miljardir pund í profitti. Russiska stjórnin hevði annars hildið fast við, at einki kaspiskt land hevði rætt til at framleiða olju til havs. Russiska uttanríkisráðið mótmælti eisini avtaluni, men meira hendi ikki.

Handilslig áhugamál ota seg eisini fram aðrastaðni í heiminum. Stutt eftir, at Arbeiðaraflokkurin hevði vunnið valið í Bretlandi í 1997, góðkendi uttanríkisráðharrin Robin Cook ein sáttmála um vápnasølu til Indonesia. Alment hevði stjórnin sagt, at hon fór at reka ein *"etiskan uttanríkispolitkk"*, sum setti forboð fyri at selja stjórnum vápn, sum kundu haldast at brúka tey til innlendis kúgan, brot á mannarættindini ella álop á annað land. Longu tá var stórur ótti fyri, at Indonesia fór at fremja fólkamorð í Eysturtimor, sum jú eisini hendi fá ár seinni. Í Bretlandi arbeiða meira enn 400.000 fólk í vápnaídnaðinum.

Hetta dømi vísir, at áhugamálini hjá einstøkum fyritøkum og einum heilum ídnaði kann stýra uttanríkispolitikkinum uttan moralsk, humaniter og løgfrøðilig fyrilit.

Indonesia er ikki einasta land, sum hevur fingið fyrimun av bretska handilspolitikkinum. Tað fyrsta árið, Arbeiðaraflokkurin hevði valdið í hesum umfari, varð ein hópur av vápnaavtalum við etiskt ivasamar stjórnir góðkendar: 84 við Pakistan, 42 við Sri Lanka og 105 við Turkaland.

Bretski almenningurin var vanur við slíkan atburð frá fyrrverandi konservativum stjórnum. Millum gølurnar kann nevnast, at tað segðist, at Mark, sonur Margaret Thatcher, fekk fleiri miljónir pund í provisjón, tá mamman skrivaði undir eina vápnaavtalu við Saudiarabia fyri 20 miljardir pund í 1985.

Í navninum á teimum kappingarføru marknaðunum eru tað tey privatu áhugamálini, sum verða røkt, meðan etikkur hevur lítlan týdning.



*USA stýðjaði talibanarnar í Afghanistan líka til 1997, hóast teir framdu ræðulig brot á mannarættindini*